## Todi gjørt sáttmála við Rók

Rókur av Fløtum Jespersen hevur skrivað sáttmála við Fremad Amager. Sáttmálin fær gildið í dag, og Todi Jónsson, nevndarformaður og virkandi stjóri í Fremad Amager, dylur ikki fyri, at hann er fegin um spælaran. - Sjálvandi fær eingin spælari garanterað eitt pláss á liðnum. Men Rókur hevur absolutt potentiali til at verða fastur partur av liðnum hjá okkum, sigur føroyski stjórin. Rókur, sum er 22 ára gamal, hevur øll ungdómsárini spælt í HB, og hevur hann eisini verið fastur partur av Formulahópinum seinnu árini.



## Filipovic skal verja B68-málið

Fyrrverandi málmaðurin hjá Skála og VB/Sumba skal næsta árið verja málið hjá uppflytarunum á Toftum. B68 hevur skrivað sáttmála fyri 2008 við 29 ára gamla serbiska málverjan Vlada Filipovic. Vlada er ikki ókendur í Føroyum. Hann varði málið hjá Skála í 2005 og 2006. Í fjør varði hann málið hjá VB/Sumba.

# Fara til Challenge-Trophy

**Challenge-Trophy í kvinnuhondbólti verður í ár spælt á Cypros. 12. februar er freistin at boða frá luttøku lokin, og Føroyar fara at søkja**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan hevur verið um tvær sera ólíkar luttøkur hjá føroyska kvinnulandsliðnum í hondbólti. Í Italia fyri fýra árum síðani fekk føroyska liðið fimm góðar dystir, har liðið ítróttarliga fekk nógv burtur úr hvørjari einstakari uppliving.

Fyri tveimum árum síðani var talan ikki um somu góðu ítróttarligu uppliving. Fram til finaluna fingu føroysku kvinnurnar at kalla onga mótstøðu. Og úrslitini í onkrum av hesum dystunum vóru beinleiðis láturlig. Í finaluni móti Bosnia var mótstøðan hinvegin ovurstór, og Føroyar høvdu at kalla ongan møguleika at nærkast gullinum, sum vertirnir tóku sær av.

### Melda til og bíða

Munurin millum tær báðar kappingar var fyrst og fremst hátturin, sum EHF nýtti, tá liðini til kappingina skuldu veljast út. Á pappírinum eru 15 lond, sum hava møguleika at taka lut í kappingini. Men har útveljingin til Italia fór fram eftir ítróttarligum fortreytum, vigaði politiska ynskið um at taka lond sum Ongland og Albania við meira undan kappingini í Bosnia.

- Vit vita einki um, hvussu skipanin verður hesaferð. Men seinast var ónøgdin sera stór – eisini innan EHF – so vónandi verður talan um eina meira spennandi kapping hesaferð, sigur Kristian Johansen, formaður í HSF.

- Men vit boða so sjálvandi frá luttøku. Verður hetta ikki gjørt, so er jú als eingin møguleiki at fara.

Og hvat um tað vísir seg, at talan aftur verður um lond sum Albania og Ongland, heldur enn Finnland og Ísrael?

- Tað mugu vit so taka støðu til til ta tíð. Og tað verður so nakað, sum vit koma at tosa við venjararnar um. Ein møguleiki er jú eisini at senda eitt yngri lið avstað. Og sjálvandi er ein møguleiki eisini at trekkja luttøkuna aftur. Tá kappingin verður løgd, fáa tvey lond boð um at standa tilreiðar, skuldu boð verið eftir teimum, so tann møguleikin er eisini til staðar. Sjálvandi treytað av, at vit vita, hvussu leisturin til kappingina hesa ferð verður. Sjálv kappingin, ið altso verður spæld á Cypros, fer fram í døgunum 25. til 30. mars.

Eftir 12. februar fæst so at vita, hvussu leisturin til kappingina hesa ferð verður. Sjálv kappingin, ið altso verður spæld á Cypros, fer fram í døgunum 25. til 30. mars.



*Talan var um stóra succes, tá føroyska kvinnulandsliðið kappaðist í Italia fyri fýra árum síðani. Men fyri tveimum árum síðani var talan als ikki um ítróttarliga lokkandi kapping*


## Økispedagogur



Tórshavnar kommuna søkir vegna Dagrøktina í Tórshavnar kommunu eftir einum økispedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber ella eftir nærri avtalu.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
- vegleiðing og ráðgeving til dagrøktarar
- skipa fyri økisfundum
- foreldrasamstarv

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv við nógvum fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Tú ert**
pedagogur, hevur royndir innan dagstovnaøkið, kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva, megnar at síggja møguleikar fram um forðingar.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguleigum viðmælum skal vera Dagrøktarskipanini, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 18. februar 2008.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Karlu Danielsen, dagrøktarleiðara, á telefon 30 20 10.

Tórshavnar kommuna